

## Starv á Hagstovuni

Til at hava um hendi fíggjarlig hagtøl um tað almenna – land og kommunur – sóknast vit eftir einum vællærdum og áhugaðum starvsfólki.
Fíggjarliga uppgerðin av tí almenna er partur av tjóðarroknskapinum, men er eisini grundarlag undir sjálvstøðugum hagtølum um leiklutin hjá tí almenna í samfelagnum.

Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, har tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

Fyrimunur er at vera útbúgvin í búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu vera Hagstovuni í hendi í seinasta lagi 1. novembur 2007. Hevur tú áhuga í starvinum og vilt vita meira, vend tær so til Hagstovuna á telefon 352800 og fá fatur á Hermanni Oskarssyni, stjóra, ella John Jacobsen, deildarleiðara.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

almannastovan
www.almannastovan.fo



## Dagstovnurin REIÐRIÐ søkir avloysara

**Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekaði børn og ung í aldrinum 0 – 18 ár. Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn og ung.**

Søkt verður eftir einum avloysara fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi. Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving, so sum námsfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur ella aðrar drúgvar royndir á økinum.

Starvið verður sett við einum vikuligum tímatali uppá 30 tímar at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar um starvið fáast at vita við at venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 44 70 03.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 25. oktober 2007, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovan, Smyrilsvegur 20
Postboks 20, 110 Tórshavn.

Vinarliga merkið brævbjálvan "Reiðrið".

KREA



## LEIÐARI TIL DEBITORBÓKHALDIÐ

**Elfelagið SEV sóknast eftir fólki at leiða debitorbókhald felagsins. Eftir føroyskum viðurskiftum er talan um stórt bókhald við 23.000 kundum, og søla okkara í fjør var um 238 mió. kr. umframt mvg.**

### UPPGÁVUR TÍNAR VERA MILLUM AÐRAR AT:

- Standa á odda fyri debitorstýringini
- Hava um hendi edv-skipanina, ið stýrir kundaviðurskiftum okkara
- Skipa fyri, at uppgerðir og rokningar verða sendar kundunum
- Samskipa kundatænastuna viðvíkjandi fyrispurningum og fíggjarmálum

### TÍNIR FØRLEIKAR:

Vit rokna við, at tú hevur hóskandi útbúgving og royndir í bókhaldi og debitorstýring, og at tú hevur góðan kunnleika til bókhaldsforrit. SEV nýtir serliga debitorskipan, sum fleiri donsk elfeløg nýta, og tú fært neyðuga upplæring í hesum forriti. Vit vænta eisini, at tú hevur góð samstarvsevni og dugir at samskipa arbeiðið við kundatænastuni innan debitorstýring. Kundatænastan verður í dag veitt á øllum skrivstovum okkara, t.e. í Klaksvík, Vestmanna, Tórshavn og í Vági.

### LØN OG SETANARTREYTIR:

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum verða løntir eftir 8. lønarflokki í sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið. Starvið hevur tilvísing til deildarstjóran fyri Fyrisitingardeildina.

Hevur tú spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við John P. Danielsen, deildarstjóra, á 34 68 00 ella á jpd@sev.fo.

### UMSÓKNARFREISTIN ER MIKUDAGIN, 31. OKTOBER 2007.

Send umsókn tína til: Elfelagið SEV
Landavegur 92, Postsmoga 319, FO-110 Tórshavn

SEV

REPROZ